# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# SUPERVAL Í HEYST

Tað var Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, sum í útvarpinum mælti til, at Kaj Leo Johannesen, løgmaður, og Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharri í Danmark, samskipaðu bæði valini til løgtingið og fólkatingið soleiðis, at tey verða hildin sama dag.

Hóast ein slík samskipan neyvan er realistisk, so eru fleiri spennandi perspektiv í slíkum. Vit hava ikki roynt tað í Føroyum, at hava fleiri val samstundis. Í Danmark royndu tey tað 20. november í 2001, tá tey høvdu kommunuval og fólkatingsval sama dag. Í 1988 høvdu vit bæði fólkatingsval og løgtingsval, og í 1990 somuleiðis, tá vóru bara eina tríggjar vikur ímillum valini bæði.

Samfelagsfrøðingurin vísti á, at eitt fólkatingsval órógvar politikkin annars, og ofta snýr valstríðið til fólkatingsvalið seg um viðurskifti, sum fara fram í Føroyum heldur enn um fólkatingsviðurskifti, og hann vísti á aðrar fyrimunir við at leggja valini sama dag:

Tað hevði verið ruddiligari hjá flokkunum, tað hevði verið bíligari fyri flokkarnar og tað hevði ført til, at somu politikarar ikki vórðu valdir í bæði tingini.

Tað er rættiliga áhugavert, at vit hvørjaferð velja løgtingsmenn í fólkatingið. Vanliga er eisini talan um leiðandi persónar í flokkunum - og seinast var tað formaðurin í Tjóðveldi og Edmund Joensen, fyrrverandi løgmaður – og táverandi løgtingsformaður.

Tað er rættilga margháttligt soleiðis at velja sama persón í tvey parlament í tveimum ymiskum londum. Hóast hendan siðvenjan er aldargomul í Føroyum, so er tað ikki vanligt í eitt nú Danmark, sum eisini velur fólk í ES-parlamentið. Tey fólk, sum verða vald í ES-parlamentið, leggja fólkatingsarbeiðið frá sær, eru tey frammanundan vald í fólkatingið. Og tey stilla ikki upp til bæði valini heldur.

Her er ein munur á donskari og føroyskari siðvenju. Vit hava bara havt tveir fólkatingsmenn, sum hava verið valdir á løgting. Teir eru Poul Adrian Andreassen, sum umboðaði Fólkaflokkin frá 1964-1968, og Johan Nielsen, sum umboðaði Javnaðarflokkin frá 1960 til 1979.



Hvussu leikur fer, er ilt at spáa um, men valla fer Kaj Leo Johannesen at skriva út val fyrr enn í fyrsta lagi í heyst – og í Danmark er magt sum bendir á, at Lars Løkke Rasmussen heldur ikki trýstir á reyða knøttin fyrr enn í heyst. Kaj Leo Johannesen hevur tó tann fyrimun, at hann hevur góðar veljarakanningar, sum kunnu eggja honum at skriva út val, meðan støðan er øvugt hjá Lars Løkke Rasmussen. Men heilt vist er, at tað ikki verður stutt ímillum valini, so hví ikki skera yvir ein kamb og halda bæði valini sama dag...?

**Margháttlig støða at velja sama persón í tvey parlament**

# Ungdómsvirksemi í nýggja skúlanum á Argjhamri

Tá nýggi skúlin á Argjahamri verður tikin í nýtsu eftir summarfrítíðina, eigur skúlin eisini at hýsa ungdómsvirksemi eftir skúlatíð. Tað heldur Levi Mørk, býráðslimur í Tórshavnar kommunu.

Hann vísir á, at karmarnar eru framúr góðir inni í nýggja skúlanum.

– Tað er upplagt, at kommunan tekur stig til at hava ungdómsvirksemi í nýggja skúlanum á Argjum. Har verður eisini frítíðarskúli, og tað er upplagt, at ungdomsvirksemi verður lagt aftrat frítíðarskúlanum. At leggja ungdómsvirksemi saman við frítíðarskúlavirksemi er ikki ókent, hetta hevur kommunan gjørt í Hoyvík, sigur Levi Mørk, sum bæði er býráðslimur og leiðari á Frítíðarskúlanum í Hoyvík.

– Í dag er einki skipað ungdómsvirksemi á Argjum, og tørvurin er stórur, og nu er tíðin omin til at bøta um støðuna. Málið verður tí lagt til støðutakan á næsta samgongufundi hjá Tórshavnar kommunu, sigur Levur Mørk.

# Kringvarpið loyvir ómentan

– »Álvaratos« er eftir mínum tykki ein primitiv og tendensiøs sending. Tað heldur Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður hjá Fólkaflokkinum.

Hann vísir á, at verturin kallar hetta eina kjaksending – men tað er heilt týðiligt, at hann velur bara panelluttakarar, sum halda mestsum tað sama (sum hann) og bara umboða ein lítlan part av tí føroysku almannahugsanini.

– Føroyingar eru tíverri sambært lóg noyddir at gjalda í dýrum dómum fyri Kringvarp Føroya, sum átti at verið ein mentanarstovnur. Men eg má siga, at eg øtist inn á ta ómentan, sum hesin stovnur í dag loyvir, og eg haldi, at hann í fleiri førum arbeiðir beint ímóti sínum endamálum.

Lesið alla greinina á síðu 23,





**Ikki spyrja sakkunnleikan**

ROLF GUTTESEN
KJAK Á SÍÐU 10



**Meðan sektirnar stríðast**

EDMUND JOENSEN
KJAK Á SÍÐU 24



# Sunrid og Annika í Smiðjuni

Tvær skapandi kvinnur fara at sýna grafisku verk síni fram í Smiðjuni í Lítluvík í komandi viku.

Tær báðar, Sunrid í Gong og Annika A. Gregoriussen, hava báðar roynt seg við ymiskum kreativum málbúnum áður. Sunrid við foto og grafikki og Annika við akryl, tussj og grafikki.

Men hesaferð sleppa við at síggja grafisku verkini, sum tær báðar hava framleitt seinastu mánaðirnar. Hóast ymsar av lyndi og tí eisini í stíli, hava tær tað eksperimenterandi og feminina í felag.

Annika A. Gregoriussen er fødd og búsitandi í Havn. Hon hevur áður sýnt fram á Várframsýningini, Ólavsøkuframsýningini og í Smiðjuni í Lítluvík.

Sunid í Gong er fødd í Havn og hvar hon eisini býr. Sunrid hevur eisini áður sýnt fram á Várframsýningini, Smiðjuni í Lítluvík, blómuhandlinum Orkis og í býráðssalinum í Saltangará.

Fernisering verður hósdagin 26. mai kl. 17 í Smiðjuni í Lítluvík. Framsýningin er opin til og við týsdagin 31. mai 2011. Opið er gerandisdagar kl. 12-18 og í vikuskiftinum kl. 12-16.

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*